# Týr er í studio

**Mándagin fór Týr í donsk upptøkuhøli, har teir fara at taka tveir sangir upp til eina stakfløgu, sum væntandi kemur út síðst í oktober mánaði**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Tað verður í Happey Alley Studio, at Týr fer at brúka næstu dagarnar.

Har fer føroyski bólkurin at taka tveir sangir upp, og tað verður navnframi Jens Rud, sum hevur ábyrgdina av tøknini og framleiðsluni.

Annar sangurin, ið Týr fer at taka upp, er Ólavur Riddararós, sum Týr hevur spælt nógv á konsertum. Hin kallast Stýrisvølurin, og tað er ein sangur, sum Heri Joensen lutvíst hevur gjørt, men sum eisini verður grundaður á gomul føroysk vísuløg.

Týr vónar, at stakfløgan kann vera klár at fáa í sølubúðirnar síðst í oktober mánaði. Í sambandi við hesa útgávuna skal Týr millum annað til Íslands at spæla og føra seg fram. Tað verður síðst í november.

# Týr spennandi skrá fyri framman

**Í oktober og november mánaði fer Týr at spæla á konsertum í fýra ymiskum londum. Teir ætla gera eitt rættiligt átak í Íslandi, tá nýggja stakfløgan hjá teimum kemur út**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Fyrstu vikuna í oktober fer Týr í upptøkuhølini at taka eina stakfløgu upp, og aftaná tað bíðar ein spennandi konsertskrá við uppgávum í fýra ymiskum londum.

Fyrsta konsert við nýggja sangaranum, Allan Streymoy, verður í Sumpinum á Oyrasundskolleginum í Keypmannahavn.

17. oktober spælir Týr á kanska best umtókta staðnum í Oslo, Smuget, og dagin eftir spæla teir á Scanart festivalinum í norska høvuðstaðnum.

7. november fer bólkurin til letland, har teir fara at spæla í høvuðsstaðnum, Riga. Dagin eftir spæla teir í býnum Jelgava, sum liggur 50 kilometrar frá Riga.

Frá 20. november til 1. desember fer Týr at ferðast í Íslandi, har teir veruligan fingu vind í seglini fyrr í ár. Tá er stakfløgan Ólavur Riddararós komin út, og sjónbandalagið til sangin Hail To The Hammer verður frumsýnt í Íslandi. Við hesum í rygginum skal Týr Royn at fáa áhugan fyri teimum upp á sama stig fyrr í ár.



*Týr hevur úr at gera komandi vikurnar*

# Gullbrúðarparið Olsen við Gøtugjógv



Í dag, týsdagin 1. oktober, eru tað fimmti ár síðani, at Marna og Jóhan Olsen, Gøtugjógv, gingu saman í hjúnarlag. Í tí sambandinum vil eg fegin bera foreldrum mínum eina kvøðu.

Pápi er gjáarmaður, sum vit plaga at siga. Hann er føddur og uppvaksin við Gøtugjógv, har hann altíð hevur búð. Foreldrini vóru Jóhanna og Olivur Olsen. Omma var úr Leirvík, og abbi var frá Gøtugjógv.

Mamma er ættað úr Sumba. Foreldrini vóru Kristina og Kristian Gunnrim. Hann hevði broytt eftirnavn frá Kjærbo. Omma var av Sandi, og abbi var úr Sumba.

Mamma var komin til Havnar at arbeiða nakað eftir kríggið. Hon hevði pláss á sjómansheiminum. Pápi var við skipi, og tey møttust á sjómansheiminum.

Tá tey giftust, búsettust tey við Gøtugjógv. Tey fyrstu árini vóru tey inni hjá ommu og abba, men síðst í fimmti árunum fluttu tey í húsini, sum tey høvdu latið byggja.

Mamma arbeiddi tey fyrru árini sum bindikona hjá Suffíu, mammu Ólav Gregersen. Tá Ólavur hevði Tøtingarvirkið, var mamma ein av mongum konum, sum arbeiddu har, og eitt skifti var hon á Frost í Leirvík.

Sum flestu aðrir dreingir so fór pápi tíðliga til skips. Hann hevur siglt við føroyskum og íslendskum skipum. Hann var í Grønlandi við Jacob Højgaard og Kongshavn og róði út við bátum, hann sigldi eitt nú við Gøtutróndi, Tinganesi og Grundick, sum farbróðurin Óla Hans Olsen førdi, Norðbúgvanum og Herthu, sum Martin í Grund førdi. Onkuntíð var hann fýrbøtari, og hann royndi seg eisini sum kokkur.

Í fleiri skiftum arbeiddi hann á skipasmiðjuni á Skála, so var hann við hekkutrolarum – bæði við Stellu Kristinu og Kristinu Logos. Pápi arbeiddi eitt skifti á Fiskavirkinum í Gøtu, og so hevur hann havt við Restorffs bryggjaríið at gera eisini.

Vit eru fýra systkin. Óluva býr á Argjum, eg búgvi í Saltnesi og Janus og Trygvi búgva í Leirvík.

Nú tað hevur stundað til gullbrúdleypið og eg havi hugsað um at senda tykkum eina heilsu, so er ein sangur, sum Christian Høj umsetti í 1976, aftur og aftur komin í hugan. Eitt ørindi ljóðar soleiðis

*Tú fekst mátt, tá tú helt*
*saman hendur*
*Og í navni hans bað tína*
*bøn*
*Og tann dag, hann Tær*
*ferðaboð sendir,*
*Tú skalt sanna, at stór var*
*tín løn,*

Vit vórðu lærd at biðja og um týdningin, sum bønin hevur. Eg hugsaði ikki so nógv um hetta tá, men nú vil eg fegin takka tykkum fyri henda lærdómin, tí eg eri vísur í, at tað hevur havt stóran týdning seinni í lívinum.

Tað var mamma, sum stóð fyri tí húsliga og lívinum í heiminum annars. Nú er tómligari, enn tað var, tá vit vóru børn. Men barnaheimið er framvegis tað sama. Mamma og pápi eru blíð at koma til hjá okkum øllum, og vit kenna okkum heima við Gøtugjógv.

Tá eg gavst í skúlanum, vildi eg fegin royna sjólívið. Tað var skjótt, at pápi hevði fingið mær ein kjans. Vit vóru eitt skifti saman í Grønlandi við Kristinu Logos. Tá var pápi kokkur, og eg vil fegin takka honum fyri, hvussu góður hann var til vegleiðing og hjálp í tí, sum hevði verið hansara lívsstarv.

Hervið vilja vit í Rók heilsa tykkum, ynskja tykkum ein góðan dag og tykkum og øllum tykkara Harrans signing í tíðini, sum kemur.

**Kristian**

# Mungát aftur á marknaðin í dag

ØL
*Tíðindaskriv*

Restorffs Bryggjarí sigur, at tey nú aftur koma á marknaðin við »serføroyska tjóðarbjórinum, Mungát«, sum bryggjaríi orðførir seg í tíðindaskrivi.

Av Restorffs Bryggjaríi siga tey, at hetta ølið upprunaliga bert varð ætlað at verða á marknaðinum um ólavsøkumundið, og tí gavst bryggjaríið við framleiðsluni.

– Tað vísti seg kortini at vera sera stórur eftirspurningurin eftir ølinum, og tessvegna hevur bryggjaríið gjørt av, at Mungát nú verður at fáa alt árið – og byrjar framleiðslan í dag, 1. oktober, sigur bryggjaríið.



*Jóhan Mortensen á Restorffs Bryggjaríið skeinkir Jóan Hendriki Winther Poulsen av nýggja ølinum, Mungát*



# Tvær milliónir í yvirskot, tá avdráttirnir eru goldnir

**Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 gevur eitt yvirskot upp á 150 milliónir krónur. Men næsta ár skal landskassin gjalda 148 milliónir krónur í avdráttum, og tí verður avlopið tvær milliónir. Rúmd verður fyri at gera íløgur fyri 260 milliónir næsta ár**

FÍGGJARLÓG
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Á tingfundi seinnapartin í gjár skuldi Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, leggja fram fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár*

*savnsmynd*

Samlaðu útreiðslurnar hjá landskassanum verða næsta ár 3.568 milliónir krónur, og sostætt veksur fíggjarlógin við 110 milliónum krónum næsta ár, sammett við fíggarlógini fyri í ár. Fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 gevur eitt yvirskot upp á 150 milliónir krónur, áðrenn avdráttirnir av skuldini til danska Ríkiskassan eru goldnar. Landskassin skal næsta ár gjalda 148 milliónir krónur í avdráttum, og tí verður fíggjaravlopið, tað er avlopið eftir at avdráttirnir eru goldnir, tvær milliónir krónur.

Fíggjarmálaráðið metir, at samlaðu inntøkurnar hjá landskassanum verða 3.718 milliónir krónur næsta ár. Skattainntøkurnar verða 1.767 milliónir, inntøkan frá avgjøldum og tolli verður 1.267, ríkisveitingin úr Danmark verður 630 milliónir og harumframt fær landskassin 54 milliónir krónur í ymsum øðrum inntøkum.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 verður mett, at inntøkurnar hjá landskassanum vaksa 3,3 prosent næsta ár, sammett við í ár. Allur inntøkuvøksturin stavar frá skatta- og avgjaldsinntøkum, sum vaksa 4,1 prosent. Harafturímóti er ríkisveitingin úr Danmark fastfryst, og verður tí tann sama sum í ár. Tó veksur ríkisveitingin við einari millión, men tað kemst av, at endurgjøldini úr ríkiskassanum til eftirlønir hjá tænastumonnum hækkar eitt vet.

Ríkisveitingin úr Danmark verður næsta ár góð 17 prosent av samlaðu inntøkunum úr Danmark. Í 1997 var ríkisveitingin næstan 32 prosent av inntøkunum.

## 260 milliónir til íløgur

Samlaðu íløgurnar næsta ár verða 260 milliónir krónur. Nógv tann størsti parturin av íløgunum, 152 milliónir, fer til vinnumál. Av vinnumálum eru serliga tvær íløgur, sum fara við stórum parti av karminum. 107 milliónir eru settar av til nýggja Suðuroyarskipið og 25 milliónir eru settar av til samferðsluhavn á Tvøroyri. 43 milliónir eru settar av til íløgur innan familju- og heilsumál. Av hesum fær Landssjúkrahúsið 40 milliónir til uppíbyggingina, meðan 3 milliónir eru settar av til íløgur í tól til sjúkrahúsverkið. 29,2 milliónir eru settar av til íløgur í útbúgving og gransking. Her fær nýggi Miðnámsskúlin, sum ætlanin er at byggja í Suðuroynni, 12 milliónir, og m.a. fær Sjónvarp Føroya fýra milliónir til íløgur í digitalisering av útgerðini. Almannamál fáa 25 milliónir av íløgukarminum á fíggjarlógaruppskotinum. Av hesum skulu 20 milliónir nýtast til eldrasambýli og eldrabústaðir, meðan fimm milliónir eru settar av til bústovnar innan serforsorgina. Av øðrum íløgum, sum eru nevndar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, kann t.d. nevnast, at fimm milliónir eru settar av til framhaldandi umbyggingarnar av løgtingshúsinum.

